# VIT eru ikki VIT longur

**– Sp/f VIT hevur nú broytt navn til Faroesoft. Eisini hevur fyritøkan fingið nýggj hølir. Faroesoft heldur nú til í Tórsgøtu 16, har Trygd var fyrr.**

NAVNASKIFTI
*Ingrid Bjarnastein*

Fyritøkan, ið fyrr kallaði seg sp/f VIT, eitur í dag Faroesoft. Tað er Farodane, sum eigur 80% av felagnum, meðan starvsfólkið eigur hini 20%.

– Vit royna at leggja dent á, at vit eru eitt software hús. Vit gera telduforrit, og taka okkum eisini millum annað av interskipanum og soft software, sigur Óli Olsen, stjóri á Faroesoft.

Sp/f VIT byrjaði á heysti 1996. Tað vóru nøkur starvsfólk á eini edv deild hjá Føroya Fiskavirking, sum tóku stig til tess. Í byrjanini tók VIT sær mest av edv útgerð til stovnar og virkir.

– Vit vóru sokallaðir edv umsitarar hjá ymsum stovnum. Hetta spjaddi seg skjótt til, at vit byrjaðu at hava skeiðstovur og fóru at útvikla software til internetið, greiðir Óli Olsen víðari frá.

– Grundin til, at vit broyttu navn til Faroesoft er, at Farodane eigur jú ein stóran part av felagnum, harav Faroe. Soft kemur so sjálvsagt av tí, at vit eru software orienterað og harvið leggja dentin á software. Farodane tekur sær mest av hardware, og vit hava so software partin hjá fyritøkuni.

At kunna veita heildartænastur er ein stórur partur av fyritøkuni. Málið er at gerast besti e-business veitari á føroyska marknaðinum.



*Óli Olsen, stjóri á Faroesoft, uttanfyri nýggju hølini*

## Sonnet

Í døkkum ótta detta heystsins bløð
sum sjónirnar í skýmdum allar nøtra –
hvar fór mín gleði? – sólin kom og fjøtrað
við summarhita barnsins leik um bø –

tí megi viknar – tendra lívsins bál
og lat meg kenna fløva tín og hita –
í køldum skugga vil eg ikki sita
við ljósins svára tosta mær í sál!

kom aftur góða ver mær altíð hjá
tí gleðin følnar burtur tí her valda
bert myrkurskaldir glottar, lívind grá –

Kom veit mær lívsins gleði og tað kalda
úr hugaheimsins tankaborgum rek
og nýggjan várs- og summarsongin vek!

**Chr. Fróði**

# Fólkaskúlin úr kreppuni


*– Økingin til fólkaskúlan er í øllum førum ein byrjan og ein góður bati, sigur Óli Holm, landsstýrismaður*

**– Játtanin verður nóg mikið til at koma upp á støðið aftur, sum var í fólkaskúlanum, áðrenn sparingarnar vórðu framdar, sigur Óli Holm, landsstýrismaður**

FÓLKASKÚLIN
*Turið Kjølbro*

Sambært uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg, sum varð lagt fram fríggjadagin, fær fólkaskúlin 12 mió. krónur meiri komandi ár í mun til í ár. Hetta er tann størsta økingin til fólkaskúlan í nógv ár, men tó langt frá nóg mikið til uppgávurnar og skyldurnar fólkaskúlin hevur. Mentamálastýrið hevur sjálvt roknað seg fram til, at 25 mió. krónur eru neyðugar til fólkaskúlan í mun til verandi játtan.

– Um ikki nóg mikið, eru 12 mió. krónur nógvir pengar, og eg vil meta, at játtanin verður nóg mikið til at koma upp á støðið aftur, sum var áðrenn sparingarnar vórðu framdar. Økingin er í øllum førum ein byrjan og ein góður bati. Umframt fær Sernámsdepilin sambært uppskotinum 2 mió. krónur afturat, sum verða oyramerktar til sernámsfrøðiligt virksemi innan fólkaskúlan, sigur Óli Holm, landsstýrismaður í mentamálum.

Sernámsfrøðiliga virksemið, landsstýrismaðurin sipar til, er játtanin til børn við serligum tørvi. Til hetta skúlaárið søkti Sernámsdepilin Mentamálastýrið um 2500 tímar til serligan tørv, men fekk játtað slakan helming. Men tvær mió. krónur nøkta langt frá tørvin.

– Upphæddin røkkur til uml. 200 tímar afturat, sigur Óli Holm.

### Endurskoða frymilin

Økingin í játtanini til fólkaskúlan komandi ár, ger tað møguligt at seta gongd á eftirútbúgvingarnar til fólkaskúlalærarar aftur. Fyri stuttum vórðu hesar steðgaðar vegna vantandi játtan. Játtanin verður eisini nóg mikið til at fylgja upp avtaluni millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið um niðurskurð til leiðslu og bókasavnsrøkt.

Ymiskt er, hvussu skúlarnir eru fyri at bjóða næmingum sínum vallærugreinir. Miðalstóru og smáu skúlarnir eru fyri vanbýti í so máta, eisini tá ið tað snýr seg um vanligar lærugreinir, sum eru kravdar sambært lóg. Tímarnir verða latnir eftir einum frymli, sum Mentamálastýrið nú ætlar at endurskoða.

– Vit miða eftir at broyta frymilin soleiðis, at hann eisini tekur atlit til smærru skúlarnar. Um hann heilt verður burtur, tori eg ikki at siga enn, sigur Óli Holm.

Arbeiðið at endurskoða frymilin skal verða liðugt í hesum árinum, fyri at kunna leggja støðið undir tímabýtið til skúlarnar næsta ár. Í ár fingu skúlarnir tímabýtið stutt upp undir summarstegð, men Óli Holm ætlar, at komandi ár skal tímabýtið verða greitt tíðliga á vári.

Ein sannroynd er, at fólkaskúlin ikki hevur verið raðfestur høgt í landsstýrinum í nógv ár, í øllum førum ikki tá ið tað snýr seg um pengar. Meðan nógv øki eru vorðin hægri raðfest, er fólkaskúlin framvegis kreppukendur.

– Mín meting er, at størri fatan er fyri fólkaskúlanum og hvønn tørv hann hevur í dag, sigur Óli Holm.

# Rentulækking

**Tryggingarfelagið Føroyar lækkar rentuna á øllum bilfíggingum hjá felagnum**

RENTUPOLITIKKUR

Trygingarfelagið Føroyar lækar nú rentuna á bilfíggingunum við trýkvart prosenti úr sjey prosentum árliga niður í seks og ein fjórðings prosent p.a.

Talan er um rentu fyri allar bilfíggingar, líka mikið, hvussu gamal bilurin er, sigur Tryggingarfelagið Føroyar í tíðindaskrivi, sent er um dagarnar.

Lækkingin er avleiðing av rentulækking á fíggjarmarknaðinum sum heild. Hendan lækkingin hevur verið, síðan Tryggingarfelagið Føroyar seinast lækkaði sína rentu., Tað var tann 1. august í ár, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Annars sigur Tryggingarfelagið Føroyar í tíðindaskrivinum, at bilfígging nú verður avgreidd beinleiðis hjá bilasøluni.

**ej**




# VINN TARV

**Vigar uml. 600 pund**



**Stað:** Millum posthúsið og telefonhúsið í Klaksvík 20. okt. kl. 14.00

Øki er býtt upp í teigar, í tilvildarligari raðfylgju

**Dómari:** Verður settur av Báruni

Vinnarin verður tann sum fær mest mykju á sín teig

**Íalt 11. vinningar**

Nr. 1: Tarvur á uml. 600 pund (MBM í Hósvík ger tarvin døgurða kláran)
Nr 2: Eitt gávukort á 500 l. olju / Statoil
Nr 3: Eitt gávukort á 1.000 kr. frá Bónus
Nr. 4: Eitt gávukort á 500 l. olju / Statoil
Nr. 5-10: 1 ks. Coca Cola frá automatini á N.P.Gøtu
Nr. 11: Ein Nokia 3330 fartelefon, frá Delta

Teigar kunnu eisini bíleggjast á telefon 225200 Vit senda um alt landið

Ein teigur 100 kr.

Teigar kunnu keypast á hesum støðum:

Shellstøðin í Klaksvík
Shellstøðin í Norðagøtu
Shellstøðin á ringvegnum í Havn

Numrini verða lýst í Sosialinum 25.10.01

STATOIL · BÁRAN · Shell · Coca-Cola